Hondbóltur

**SUNSET KAPPINGIN** KVINNUR

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 18 | 16 | - | 1 | - | 1 | 535 | 404 | 131 | 33 |
| 2 VB | 18 | 10 | - | 2 | - | 6 | 423 | 391 | 32 | 22 |
| 3 Neistin | 18 | 11 | - | 0 | - | 7 | 441 | 426 | 15 | 22 |
| 4 Kyndil | 18 | 7 | - | 1 | - | 10 | 417 | 462 | -45 | 15 |
| 5 StÍF | 18 | 5 | - | 1 | - | 12 | 406 | 441 | -35 | 11 |
| 6 VÍF | 18 | 2 | - | 1 | - | 15 | 388 | 486 | -98 | 5 |

**ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN** MENN

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 StÍF | 18 | 14 | - | 1 | - | 3 | 534 | 418 | 116 | 29 |
| 2 Neistin | 18 | 12 | - | 1 | - | 5 | 514 | 470 | 44 | 25 |
| 3 Kyndil | 18 | 10 | - | 1 | - | 7 | 486 | 484 | 2 | 21 |
| 4 H71 | 18 | 6 | - | 2 | - | 10 | 450 | 462 | -12 | 14 |
| 5 VÍF | 18 | 6 | - | 2 | - | 10 | 476 | 510 | -34 | 14 |
| 6 KÍF | 18 | 2 | - | 1 | - | 15 | 423 | 539 | -116 | 5 |

Kyndil-H71 27-27 (10-15):

# Uttan Høgna gekk ikki

**Kyndil snávaði móti H71, og so eru útlitini fyri eini FM-finalu móti StÍF nógv kámari, enn tey hava verið**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Enn er Kyndil ikki heilt úti úr FM-stríðnum, men tað fer at krevja nakað heilt, heilt serligt, skulu teir grønu triðja árið á rað spæla seg í FM-finaluna.

Javnleikurin móti H71 í gjárkvøldið bar nevnliga við sær, at Kyndil nú er fýra stig aftan fyri Neistan. Tveir dystir eru eftir at spæla, og hjá Neistanum kunnu uppgávurnar neyvan vera truplari, enn tær eru móti Kyndli og StÍF. Men við innanhýsis málroknskapinum í mentu, so skal Kyndil vinna dystin við 13 málum, skulu teir vinna seg framum Neistan í innan hýsis uppgerðunum.

### Uttan Høgna

Kyndil hevði valt ikki at taka Høgna Klein og Josef Abrahamsen upp til dystin. Serstakliga hevur Høgni verið sentralur í endurreisnini, sum Kyndil hevur upplivað seinastu mánaðirnar, og tí kundi roknast við, at hetta fór at ávirka spælið.

At liðið so eisini misti Hjalta M. Jacobsen, gjørdi ikki støðuna betri, tí uttan hesar báðar var ilt at síggja, hvør skuldi binda spælið hjá Kyndli saman.

Fyri steðgin gekk mest sum alt eisini galið. Hoyvíkingar hava kanska einki at spæla fyri, men í eini grannauppgerð er tendringin altíð í topp, og tað fingu teir grønu at kenna.

Við fimm málum á muni í steðginum stóð greitt, at Kyndil skuldi sveiggja seg alvorliga upp, skuldu teir røkka nakrari finalu, og tað gjørdu teir so sanniliga eisini.

### Rutsjutúrur

Tað tók teimum bert 10 minuttir at vinna seg framum H71, og so byrjaði gysarin hjá grønu áskoðarunum av álvara. H71 megnaði at svara aftur, hóast Kyndil hevði hug at leypa avsatð, og bara sjey minuttir fyi leiklok vóru gestirnir aftur trý mál frammanfyri.

Kyndil noktaði tó at sleppa, og áskoðararnir sluppu veruliga á ferð gjøgnum ein kenslusligan rutsjutúr seinasta minuttin. Fyrst fekk Hanus Johansen tveir fingrar frá dómarunum. Síðani misnýtti Johnny Durhuus brotskast fyri H71, og tá Rani Ellingsgaard so skoraði til 27-26, var fagnaðurin ovurstórur.

Ein fyrrverandi Kyndilsspælari setti tó ein ógvusligan steðg fyri øllum hesum. Niels Viggo Niclasen knústi í seinastu sekundunum vónirnar, tá hann sendi bóltin í netið til endaliga javnleikin.



*FM-vónin hjá Kyndli brast, tá teir ikki megnaðu at halda høvdinum kalt seinastu fáu sekundini av dystinum móti H71*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Fakta um dystin

**Kyndil-H71 27-27 (10-15)**
**10 min: 4-3**
**20 min: 6-11**
**40 min: 17-16**
**50 min: 21-21**
**Málskjúttar**
**Kyndil: Finnur Hansson 9(2), Hans Áki Dal-Christiansen 6(2), Rani Ellingsgaard 4, Ken Zachariassen 3(1), Janus Einar Sørensen 3, Hanus Johansen 2**
**H71: Dánjal Tórgarð 7, Janus Sørensen 6, Niels Viggo Niclasen 5, Johnny Durhuus 4(4), Halgir Dahl Olesen 2, Hans Kári Hansen 1**
**Brotskøst: Kyndil 7, H71 5**
**Útvísingar: Kyndil 6, H71 5**
**Diskvalifikatiónir: Kyndil 1 (3X2 minuttir), H71 1 (3X2 minuttir)**
**Dómarar: Dánjal Samuelsen & Birger Jensen**

## Finalan farin

- Sjálvandi kunnu vit røkka Neistanum í teori'ini. Men 13 mál er for nógv at vinna aftur í einum dysti.

Janus Einar Sørensen hjá Kyndli ivast ikki eitt sekund, tá hann verður spurdur, um FM-finalan nú fer at standa millum Neistan og StÍF.

- Men vit kunnu so bara takka okkum sjálvum, tí handan dystin tveittu vit burtur. Sjálvandi er Høgni ikki við, og tað merkist. Men vit eiga at loysa hasa uppgávuna.

- Og ístaðin gera vit alt truplari fyri okkum sjálvur. Vit skjóta Jens upp til at standa sum Føroya besti málmaður, og tá H71 fleiri ferðir revsar okkum við kontramálum verður møtbrekkan stór.

Tit koma kortini aftur í dystin, men megna ikki at standa mát í allar 60 minuttirnar?

- Ja. Har gjørdist nakað tunt hjá okkum. Hjalti beklar og noyðist út. Hanus fær krampa og Ken fær reytt kort, so har var ikki tað heilt stóra eftir á beinkinum. At tað so kortini kemur hartil, at vit í nøkur sekund halda okkum hava vunnið, áðrenn verjan kiskar í seinasta H71-álopinum, ger tað ikki betri.

Eftir dystin funnust fleiri at dømingini av dystinum, men Janus Einar vildi ikki geva dómarunum skuldina fyri, at Kyndil ikki verður í finaluni.

- Teir høvdu eina sera løgna linju, har útvísingarnar vóru sera nógvar í tali. Men tað er tað sama fyri báðar. Størsti taparin í so máta var kanska sjálvur dysturin, sum gjørdist ógvuliga rótutur. Men vit kunnu ikki geva dómarunum skuldina fyri, at vit ikki vunnu, sigur Janus Einar Sørensen.

**-mørk**

Kyndil-Stjørnan 22-30 (11-14):

# Nú er tað upphiting

**Stjørnan hevði ikki teir stóru trupulleikarnar av Kyndli, nú Klaksvíkarkvinnurnar hita upp til FM-finaluna**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Stjørnan hevur longu vunnið kappingina um at sleppa í FM-finaluna. Og munurin niður til næstu liðini er somikið stórur, at tær eisini hava vissað sær, at ein møgulig triðja finala skal spælast í Klaksvík.

Tí var tað kanska so sum so við spenninginum, tá Klaksvíkarkvinnurnar vitjaðu hjá nummar fýra í landskappingini í tí, sum eisini var ein endurtøka av steypafinaluni millum liðini báði.

Men tað merkti tó ikki, at stjørnurnar tóku sær heilt av løttum í Havn í mikukvøldið. Ein av dygdunum hjá Henrik Gerster sum venjara, er, at hann ongan tíð hevur loyvt spælarunum at taka sær veruliga av løttum. Ein fella, sum kanska er størsti vandin hjá liðnum, sum á pappírinum er nógv sterkasta kvinnuliðið í landinum.

Fyri steðgin hekk Kyndil so hampuliga væl við, men tó ikki meira enn so, at Stjørnan var omaná. Bæði leikliga og á máltalvuni.

Myndin var kanska ikki heilt ólík henni frá steypafinaluni, har Stjørnan við einum seigum trekki togaði seg alt longur frá Kyndli, ið ikki hevði orkuna ella styrkina at fylgja við.



*Hjá Stjørnuni snýr tað seg bert um at fáa tíðina fram til FM-finaluna at ganga. Men hóast hetta slakaðu tær ikki, tá tær vitjaðu Kyndil*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Fakta um dystin

**Kyndil-Stjørnan 22-30 (11-14)**
**10 min: 4-5**
**20 min: 8-11**
**40 min: 16-20**
**50 min: 20-26**
**Málskjúttar**
**Kyndil: Lina Andriulyta 8, Ronja M. Mikkelsen 4(3), Randi Wardum 4, Jacklin Durhuus 3, Tordis Tróndarson 2, Barbara Egilstrøð 1**
**Stjørnan: Simona Petersen 10(4), Durita Christophersen 8, Durita Mikkelsen 3, Joan M. Djordjevic 3, Durita Ljósstein 2, Bára S. Klakstein 2, Anna Kristina Samson 2**
**Brotskøst: Kyndil 3, Stjørnan 4**
**Útvísingar: Kyndil 4, Stjørnan 3**
**Diskvalifikatión: Stjørnan 1 (reytt til beinkin)**